# Læraravegleiðing: 3.1.1. Tilfar og samansetingar

**Evni**

- Tigulsvørur
- Múrsteinsvørur
- Samansetingar av tigul- og múrsteinsvørur
- Endurnýtsla

**Mælt tíðarætlan:**

55 min.



## Tigul

Undirvísingartilfartil skeið um endurnýtsluav tigulsteinum í bygging

## Innleiðsla

Í tilfarinum er eitt sjónband, ið greiðir frá, hví tigultilfar er serliga egnað til endurnýtslu, og hvørjir fyrimunirnir eru við hesum. Fokus er á endurnýtslu og týdningin av at velja rættar samansetingar av tigul og múrstein. Fyrimunirnir við at brúka endurnýtslu við atliti til veðurlag og tilfeingi verða á eini yvirskipaðari støði sýndir fram.

Ein uppgáva er gjørd í samband við sjónbandinum við spurningum fyri at tryggja, at lærlingurin arbeiðir við viðkomandi evnum, samstundis sum lærlingarnir fáa royndir við fakligu vitan. At enda verður kunning býtt í flokkinum, har lærlingurin hevur møguleika at deila síni svar frá spurningarnar í uppgávuni og hugsa um innihaldið í sjónbandinum.

## Fyrireiking

<u>Lærarin skal:</u>

- Fáa yvirlit yvir tilfarið/gongdina.
- Fáa lærlingin í gongd við at hyggja at sjónbandið.
- Hjálpa lærlinginum við ráðgeving at svara uppgávuni. Lærarin skal vera fyrireikaður við vitan um tjóðskaparkrøv til burðarevni, ísólatión, brunaverndir og útsetingarflokkar. (sí møguliga loysnir fyri uppgávur)
- Stýra kunningardeilingini og geva øllum luttakarum møguleika at siga síni svar til uppgávurnar og seta spurningar, forkláringar og viðmerkingar.
- Hjálpa til við at greiða svarini hjá luttakaranum og skriva tey upp sum felags floksviðmerking.

<u>Luttakarin skal:</u>

- Kunna síggja og hoyra sjónbandið.
- Kunna endurgeva, hugsa um og nýta sína vitan til at loysa uppgávur.
- Kunna forklára (deila vitan) sínar spurningar og svara uppgávuni.

# Læraravegleiðing: 3.1.1. Tilfar og samansetingar

- Kunna lurta eftir svari hjá øðrum luttakarum.
- Kunna tekna/skriva viðmerkingar, ið hjálpa teimum at minnast sína vitan og sjónarmið.

Undirvísingin:

- Undirvísingin verður miðlað við einum blandaðum av einstaklingaarbeiði og bólkaarbeiði. Luttakararnir kunnu taka lut í undirvísingini hvør sær ella í smærri bólkum. Innihaldið í sjónbandinum og svarini frá uppgávunum verða savnað saman í kunningardeilingini, har lærarin hjálpir lærlinginum at greiða síni svar og skriva tey uppá talvuna sum felags floksviðmerking.

Undirvísingarhøli:

Gjøgnumføringin av undirvísingini krevur:

- At luttakarin kann síggja sjónbandið á heimasíðuni.
- At luttakarin fær kunning um uppgávuna.
- At luttakarin hevur møguleika at skjalfesta sínar tankar á hóskandi hátt.
- At luttakarin hevur møguleika at samskifta síni svar.

## Læringamál

- Lærlingurin kennur ymisk sløg av tigultilfari aftur (Nýtt tilfar og endurnýtt tilfar) (V1).
- Lærlingurin kennur ymiskar dygdir aftur (V1).
- Lærlingurin kann yvirskipað meta um munin á veðurlagsálopinum millum endurnýttar og nýggjar tigulsteinar (H2).
- Lærlingurin kann velja hóskandi fylgitilfar til ávísar uppgávur (F2).

## Innihald og endamál

Endamálið við innihaldinum er at geva lærlinginum vitan um, hvussu ein kann forða fyri at brúka múrstein, sum er so sterkur, at tigulsteinarnir ikki kunnu reinsast og endurnýtast á longri sikt.

## Uppskot til undirvísingarætlan:

Lærarin byrjar tíman og innleiðir tilfarið/gongdina (5 min):

- Innleiðing/endurinnleiðing til heimasíðuna.

Sjónband (5 min):

- Lærlingurin hyggur at sjónbandinum.

Uppgávur til sjónbandið (30 min):

- Eftir at lærlingarnir hava sæð sjónbandið, arbeiða teir við at svara spurningum og loysa uppgávur, ið eru knýtt til evnið, sum tryggjar, at lærlingurin lærir innihaldið at kenna, ið er knýtt til læringamálini.

# Læraravegleiðing: 3.1.1. Tilfar og samansetingar

Kunningardeiling (15 min):

- Kunningardeiling á floksstigi við felags gjøgnumgongd av evninum og viðkomandi spurningum, sum skulu viðgerast í felag. Hetta verður gjørt við hjálp av eini framløgu, sum stuðlar kunningardeilingini og samanfatar týdningarmiklastu punktini frá undirvísingini, umframt við at nýta hættir til felagsframleidd vitan, so sum at skriva svar/viðmerkingar/hugtøk uppá talvuna ella í eitt felags skjal (15 min).

## Sundurgreining

Førleikin hjá Luttakaranum at skilja og hugsa um innihaldið í sjónbandinum og leita eftir vitan um evnið gevur møguleika at luttaka við meira ella minni framsøknum íkasti til kunningardeilingina.

## Afturboð og meting

Við hvørjum íkasti fær luttakarin beina afturmelding frá læraranum, har lærarin hjálpir til við at greiða frá grundgevingunum, áðrenn íkasti verður skrivað uppá talvuna. Luttakarin fer at uppliva, at 'góð' íkast verður góðtikið og skrivað beinleiðis uppá talvuna, meðan óneyðug/skeiv íkast verða orðaðar av nýggjum í samstarvi millum læraran og luttakaran, áðrenn tær verða skrivaðar uppá talvuna.